# Long tíð og nógvir pengar

*Íløgur skulu gerast fyri nógvar milliardir, áðrenn olja fæst úr okkara undirgrund - og tað kunnu ganga 10 ár, áðrenn nakað sæst aftur*



*Borað verður nú eftir olju ... við føroyska markið. ... pallar ... megin markið eisini, krevur tað milliardir í íløgur*

Í álitinum frá oljuráðleggingarnevndini, sum nú fæst til keyps í bókhandlunum, og sum vit prentaðu vinskt úr í gjár, verður eisini greitt frá, hvussu gongdin kann vera í eini oljuútvinningarætlan fyri Føroyar.

## Fýra skeið

Ein verkætlan fyri útvinning av olju úr føroysku undirgrundini, hevur fýra skeið
- Forkanningar
  Leiting og meting
- Útbygging og útvinning
- endi

Hvørt av hesum skeiðum tekur langa tíð og alt kostar nógvar pengar.

## Forkanningar

Hetta eru seismiskar kanningar. Tær taka millum eitt og trý ár at gera. Prísin er vert at áseta. Verður ein leyslig kanning gjørd á einum lítlum øki kostar hon einar 5 milliónir, meðan prísurin lættliga kann verða 50 milliónir, um kannaða økið er stórt, og kanningarnar neyvar.

## Leiting og meting

Hetta fer fram við seismiskum kanningum og boringum.

Nevndin heldur, at tað fer at taka minst 8-10 ár frá tí at farið verður undir fyrstu stórøkiskanningina, til vissa er fingin fyri, at tað loysir seg at útvinna olju.

Prísurin er millum 200 og 300 mió. kr. fyri hvørja verkætlan.

## Útbygging og útvinning

Hetta er tann størsta íløgan. Útreiðslur til pallar, viðgerðarvirki og rørleiðingar koma upp í fleiri milliardir krónur.

Eitt til fýra ár ganga, frá tí at farið verður undir útvinningina av álvara, til fyrsta oljan kemur uppá land.

Hvussu langt útvinningarskeiðið er, veldst um støddina og umstøðurnar. Tað kann taka úr fáum árum upp í 20-30 ár.

## Endi

Tá oljan er tikin upp, liggur tað á oljufelagnum at beina burtur útvinningarútbúnaðin heilt ella fyri ein part. Hetta verður gjørt samsvarandi altjóða avtalur.

Tilsamans kunnu ganga 15-30 ár at fremja eina oljuútvinningarætlan. Og 10 ár kunnu ganga frá teimum fyrstu leitingarútreiðslunum, til inntøka fæst av sølu av fyrstu framleiðsluni.

## Góðar 8 mió. fyrstu trý árini

Tær heilt stóru íløgurnar er sjálvandi ikki nakað, føroyingar fara at standa fyri. Okkara partur verður at selja loyvi og rættindi.

Nevndin hevur tí eisini gjørt eina meting av, hvussu nógv tað fer at kosta føroyingum at fyrireika seg til oljuvinnuna.

Metingin er, at tað fer at kosta 8,3 mió.kr. fyrstu trý árini. Við hesi upphædd skuldu vit kunnað fyrireikað okkum so mikið væl, at vit vit kunnu bjóða feløg um tilboð til at gera kanningar.

-sisa-

SOSIALURIN
– einasta blað 5 ferðir um vikuna

ÚTSØLA ÚTSØLA ÚTSØLA
Hósdagin 22. juli
byrjar
ÚTSØLAN
Højgaards Handilsvirki
Runavík
Tlf. 47976 - fax. 47977

KALLKYN
ÓLAVSØKU TILBOÐ !
FRÁ 22.07. TIL ÓLAVSØKU
ALLAR
uttan núverandi tilboðsvørur
÷25%
KALLKYN Tórsgøta 11
Tlf. 16206